FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 15. januar 2025
J. nr.: 25/01126-2

Skrivligur fyrispurningur
eftir §52a í Tingskipanini

Svar frá Ruth Vang, landsstýriskvinnu, til §52 a – fyrispurning nr. 52-064/2024 frá Jørgini Niclasen, løgtingsmanni, um talgilda tolling av frakt hjá privatpersónum

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Ætlar landsstýriskvinnan at loyva privatfólki at tolla frakt sjálvi talgilt, eins og vinnulívið kann?*
2. *Ætlar landsstýriskvinnan at loyva speditørum at tolla frakt talgilt fyri privatkundar, eins og speditørar kunnu fyri vinnukundar?*
3. *Um ja, nær kann roknast við at slík skipan verður sett í verk?*

Svar

Ætlanin er, við kunngerð, at loyva flutningsfeløgum og speditørum at tollavgreiða fyri privatkundar á sama hátt, sum hesi tollavgreiða fyri vinnukundar.

Á TAKS eru tey um at verða liðug við at broyta KT-skipanina, so latið verður upp fyri, at flutningsfeløg og speditørar kunnu tollavgreiða fyri privatkundar. Tað verður væntandi til várs, um ikki okkurt óvæntað stingur seg upp.

At privatkundar kunnu tollavgreiða frakt talgilt sjálvi, er ikki ein partur av hesum.

Tinganes, 15. januar 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum